# Arsenal tryggjar Chelsea Premier League finalu

**Aftur hetta vikuskiftið vóru nógvar umtalaðar dómaraavgerðir í Premier League og endin av øllum tí er, at komandi sunnudag verður eitt brak av einum dysti á Old Trafford millum Manchester United og Chelsea, ið helst avgerð hvør vinnur enska meistaraheitið í ár**

Tróndur Arge



Fyrr í ár gekk illa í hond hjá Chelsea, sum upp á eitt tíðspunkt var heili 15 stig aftanfyri Manchester United. Dreymurin um at vinna meistaraheitið var burturblivin í eini røð av vánaligum avrikum og fokus var sett á Champions League. Inn kom Fernando Torres fyri áleið eina hálva milliard krónur, men hann tóktist ikki kunna skora um málið so datt á hann. Í Champions League taptu teir fyri einum betri Manchester United liðið og bløðini vóru á tremur við søgum um venjaraskifti og óvinskap millum framherjarnar. Í øllum hesum krepputosinum, datt boðskapurin um góðu gongdina í Premier League niður ímillum. Tá Chelsea vann, so var yvirskriftin, at Fernando Torres ikki skoraði, ella at Didier Drogba var ónøgdur ella at venjarin skuldi koyrast. Men sannleikin er tann, at Chelsea, nú tað eru trý umfør eftir, við at vinna sínar dystir sjálvt kann avgera um meistaraheitið endar á Stamford Bridge – tað kann einki annað felag uttan Manchester United erpa sær av.

### Akkurát ikki innanfyri

Tað var ikki uttan hjálp, at Chelsea fekk øll trý stigini í grannauppgerðini í vikuskiftinum móti Tottenham á Stamford Bridge. Gestirnir komu á odda við dundurskoti frá Sandro í fyrra hálvleiki. Tað sá einki út hjá Chelsea, tá Frank Lampard stutt undan hálvleikssteðginum royndi seg við skoti. Málmaðurin hjá Tottenham, Heurelho Gomes, misti bóltin millum beinini, vendi sær og strekti seg alt hann var mentur fyri at náa bóltinum áðrenn hann fór um málstrikuna. Hetta er ikki fyrstu ferð, at Gomes hevur lætið inn bílig mál, men hesa ferð vístu sjónvarpsmyndirnar, at hann faktist megnaði at steðga bóltinum áðrenn hann var heilur innanfyri málstrikuna. Linjuverjin metti tó, at so var ikki og Chelsea hevði javnað.

### Meistaraheits hepni?

Tað er tiltikið, at liðini, ið vinna meistaraheitini, hava eitt ávíst hepni á sínari síðu. Spurningurin er so, um tað er tað hepni, sum flylgdi Chelsea leygardagin, tí stutt fyri tíð koppaði enn ein avgerð til fyrimuns fyri teir bláu úr London. Innskifti Salomon Kalou tóktist verða akkurát rangstaddur, tá hann í 89. minutti legði Chelsea á odda. Hóast alt prátið um kreppu og feilkeyp, so er støðan tann, at Chelsea komandi vikiskiftið fer til Old Trafford við einum møguleika at vinna meistaraheitið.

### Endiliga riggaði hjá Arsenal

Tá tað nú eydnaðist Arsenal at vinna ein týðandi sigur, er avleiðingin at grannarnir úr Chelsea sleppa framat í stríðnum um enska meistaraheitið. Arsenal hevur leingi verið fremsti avbjóðarin til Manchester United, men ein røð av verju og málmansvillum hevur spent bein fyri einum meistaraheitið og úrslitið er, at teir bara kunnu búka sigurin til eitt herðaklapp.

Arsenal var uttan liðskiparin, Cesc Fabregas og í hansara stað hevði Arsenal venjarin, Arsene Wenger, valt 20-ára gamla walisan, Aaron Ramsey. Tað skuldi vísa seg at verða ein góða avgerð. Mest umtalaða støðan í fyrra hálvleiki var tá Arsenal vildi hava brotsspark. Eftir innlegg úr høgru er Manchester United miðverjin, Nemanja Vidic, fyrstur á bóltin, sum fer út til horna. Meðan Arsenal framherjin, Robin van Persie, royndi at gera vart við eitt hvørt vístu sjónvarpsmyndirnar, at serbin nýtti hondina til hjálpar. Hóast Robin van Persie royndi at forklára dómaranum hvat var hent, so fingu teir bara horna burtur úr støðuni.

Tíggju minuttir fyri hálvleik kom einasta málið í dystinum. Robin van Persie legði innfyri úr høgru, har Aaron Ramsey plaseraði bóltin í málið til stóra gleði fyri Arsene Wenger og Arsenal. Eftir hetta tók Manchester United meira yvir og onkuntíð var vandi á ferð, men Wojciech Szczesny í Arsenal málinum tók sær av tí, sum var at gera. Í hinum endanum vóru Arsenal óneyvir við seinastu sendingini og tí hevði Edwin van der Sar lítið at gera.

Tríggjar minuttir fyri tíð vildi Manchester United so hava brotsspark. Innskifti Michael Owen fór umkoll í Arsenal brotsteiginum, men aftur valdi dómarin ikki at bríksla. Sjónvarpsmyndirnar vístu at tað var samband millum Michael Owen og Arsenal verjuleikaran.

### "Mind games"

Hugtakið "mind games" verður brúkt, tá ein venjari onkursvegna roynur at leggja trýst á dómaran ella skapa órógv í hópinum hjá mótstøðuliðnum, við at úttala seg um ávís ting upp á ávísar mátar. Hetta hevur Sir Alex Ferguson verið tiltikin fyri at duga væl. Hvør minnist ikki, tá Kevin Keegan mitt í 90'inum misti eina leiðslu upp á 12 stig og bleiv í øðini inn á Sir Alex beinleiðis í sjónvarpi. Hann hevur longu vent eyguni móti dystinum komandi vikuskiftið, tí eftir dystin móti Arsenal segði hann, at Chelsea tykist fáa allar dómaraavgerðir til teirra fyrimun, meðan Manchester United eru fyri óróttum. Hann vísti eisini til nakrar avgerðir, ið hava verið til fyrimuns fyri Chelsea í dystum móti júst Manchetser United. Viðvíkjandi hondini hjá Nemanja Vidic, ið skuldi verið brotsspark til Arsenal og helst reytt kort til Nemanja Vidic segði hann, at tann støðan var sera torfør at fáa eyga á og tí var tað ikki eins klárt brotsspark og tað hjá Michael Owen móti endanum. Sir Alex er ikki býttur og veit væl, at Nemanja Vidic var heppin. Tað hevur tó eydnast honum longu nú, at lagt trýst á domaran til komandi vikuskiftið. Um tað riggar ella ikki skal verða ósagt, men Sir Alex veit hvørja knappar hann skal trýsta á, tí hann hevur verið í oddinum í enskum fótbólti í skjótt tjúgu ár.

### Premier League finalan

Sostatt eru útlit fyri eini finalu, ið helst kemur at avgerða hvør vinnur Premier League í ár. Manchester United hevur munin, tí teir eru trý stig fremst og hava heimavøll. Bæði liðini hava +38 í málúrtøku. Umframt Chelsea, so hevur Manchester United Blackburn á útivølli og Blackpool á heimavølli eftir. Chelsea skal á vitjan hjá Everton og fær vitjan av Newcastle. Í fjør hittust liðini í eini líknandi støðu, tá vann Chelsea 2-1. Dysturin millum Manchester United og Chelsea verður sunnudagin klokkan 16:10.